Oyggjablaðið

Mikudagur 13. apríl 2011 · Nr. 44




**100 MIÓ**

*Flakatrolarin Sisimiut hevur seinastu árini selt fyri einar 100 mió krónur um árið. - Hetta er eitt gott skip, sigur Arnfinnur Jacobsen*

# 400 eftir

Sisimiut-trolarin er á mangan hátt rættiliga líkur teimum flakatrolarunum sum vit kenna her á landi.

Hann er 66 metrar langur og 14 metrar breiður, og lastar eini 700 tons. Teir plaga vanliga at fara til fiskiskap í januar mánaði, og leggja tá til brots í Barentshavinum fram til apríl/mai mánað.

- Tá er kvotan vanliga uppfiskað, og síðani flyta vit okkum til Eysturgrønlands, har vit royna eftir svartkalva og onkutíð eisini kongafisk. Vit hava somuleiðis eina svartkalvakvotu í Vesturgrønlandi

- Tá vit nú eru lidnir at landa her í Kollafirði, seta vit beina kós norður aftur í Barentshavið, har vit skulu fiska restina av okkara kvotu. Eg haldi, at vit hava eini 400 tons eftir, greiðir Arnfinnur frá.

## Eg mynstraði umborð í gjár, og nú gleði eg meg bara at loysa frá landi